Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við ansing av barni, ið til dømis ber brek ella hevur varandi sjúku (uppfyljgandi spurningar)

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrið at broyta løgtingslógina um almannatrygd og tænastur og/ella tilhoyrandi kunngerð, soleiðis at frítíðarløn frá arbeiðsplássum ikki verður mótroknað í endurgjaldinum fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við ansing av barni, ið til dømis ber brek ella hevur varandi sjúku?

Viðmerkingar:

Fyri nøkrum vikum síðani setti eg ein § 52a fyrispurning um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við ansing av barni, ið til dømis ber brek ella hevur varandi sjúku (tingmál nr. 52-057/2022). Spurt varð, hvør orsøkin er til, at endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við ansing av barni, ið til dømis ber brek ella hevur varandi sjúku, ikki eisini verður veitt fyri frítíðarløn? Eisini varð spurt, um landsstýrið ætlar at broyta hesa ásetingina?

Landsstýrismaðurin svaraði, at nevndu fólk fáa endurgjald við frítíðarløn. Tað er rætt, men spurningurin snúði seg ikki um at fáa frítíðarløn av endurgjaldinum. Spurningurin snúði seg harafturímóti um at frítíðarløn frá øðrum arbeiðsplássi verður mótroknað í útgjaldinum.

Um til dømis eitt barn skal undir skurð í apríl, og annað av foreldrunum tí má vera heima í apríl og mai, so fáa tey ikki endurgjald fyri mai, tí tá verður frítíðarlønin frá arbeiðsplássinum útgoldin. Skulu tey so í feriu í juli, so fáa tey einki tá, tí frítíðarlønin sum tey áttu til góðar, bleiv brúkt í mai. Eg seti tí henda uppfylgjandi spurningin.

Á Løgtingi, 6. februar 2023

Helgi Abrahamsen